

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Starvsfólk til eldraøkið

Fyri at økja um venjingartilboðini til eldru borgararnar í Tórshavnar kommunu verður søkt eftir einum fysioterapeuti ella øðrum við heilsufakligari útbúgving við førleika at skipa fyri venjingum.

**Arbeiðsuppgávurnar**
At skipa fyri venjingum fyri pensjónistar. Venjingartilboðini skulu innihalda fyribyrgjandi og styrkjandi venjingar, ið hava til endamáls, at tey eldru longst til ber verða sjálvhjálpin í gerandisdegnum heima og úti.

**Vit ynskja**
At tú ert útbúgvin sum fysioterapeutur ella hevur aðra heilsufakliga útbúgving, royndir og áhuga at arbeiða við eldri fólki og hevur kunnleika til:
- Vanligar ellisbroytingar og ellissjúkur
- Heilsufremjan og fyribyrging
- At meta um førleika
- EDV á brúkarastøði

**Persónligir eginleikar**
- Er fyrikomandi og álitisvekjandi
- Kann arbeiða sjálvstøðugt

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Tú kemur at starvast í Fysioterapiini á Tjarnargarði. Talan er um fast starv, og tú kemur at starvast í toymi saman við terapeutum innan eldraøkið í Tórshavnar kommunu. Tú kemur at hava tilvísing til Heimavitjunartænastuna.

Starvið verður sett skjótast tilber.

Starvið verður skipað undir Trivnaðarfyrisitingini í Tórshavnar kommunu.

**Meiri fæst at vita**
Við at venda sær til Marjuna Poulsen, toymisleiðara á telefon 35 67 95, t-postur: marjunp@torshavn.fo, ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara á 30 20 10.

**Umsókn**
Saman við møguligum viðmælum og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir skal vera hjá Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 3. juli 2009. Setanarsamrøða verður í viku 28.

Merkið umsóknina Starvsfólk til Heimavitjunartænastuna.

## Kontaktpersónur til Barnaverndartænastuna

Søkt verður eftir kontaktpersóni til 11 ára gamlan drong. Talan er um 10 tímar um vikuna eftir skúlatíð/vikuskifti.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur viðkomandi royndir innan økið.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt eftir sáttmála hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Tórshavnar kommuna, Barnaverndartænastan, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 26. juni 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Barnaverndartænastuna á telefon 30 20 60.

## Pedagogar til Dagstovnin á Løgmannabreyt

Søkt verður eftir eftir tveimum pedagogum til barnagarðsstovu at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 3. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Dagstovninum á Løgmannabreyt 73, Boks 3027, 188 Hoyvík, seinast mikudagin 1. juli 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sofíu Nattestad, stovnsleiðara, á telefon 31 91 05 ella 21 91 05. Heimasíðan www.logmannabreyt.fo.

## Pedagogar til Dagstovnin Kurl@

Søkt verður eftir einum pedagogi til vøggustovuna at arbeiða 32 tímar um vikuna og einum pedagogi til barnagarð at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Dagstovninum Kurl@, Sundsvegur 3, 100 Tórshavn, í seinasta lagi sunnudagin 28. juni 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ann Jacobsen, stovnsleiðara, á telefon 30 22 70 ella við at hyggja inn á heimasíðu okkara 123hjemmeside.dk/kurla.

## Pedagogur til Lítlaskóg

Søkt verður eftir einum pedagogi til barnagarð at arbeiða 20 tímar um vikuna og einum hjálparfólki til barnagarð at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 3. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Lítlaskógi, boks 217, 110 Tórshavn, innan mánadagin 29. august 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Beintu Dalbø, stovnsleiðara, telefon 21 91 35.

**Tórshavnar kommuna**